


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Eiga fjølbrekað ongan góðan?



Val

BILL JUSTINUSSEN
løgtingsmaður

Tað var lítið hugaligt at vitja á einum stovni fyri fjølbrekað fyrr í vikuni. Ætlanin var í sambandi við stutt sjónvarpsinnslag at gera nakrar fáa upptøkur, so til bar at lýsa støðuna hjá fjølbrekaðum á stovni. Í einum vanligum sethúsum trokaðust 8 fjølbrekað saman við 7 starvsfólkum í einum alt ov trongum sethúsum. Heldur ikki var nakað tún rundan um, so tey kundu sleppa útum at svala sær á, teir dagarnar, veðrið vísir seg frá síni bestu síðu. Ein brøtt brekka oman til húsini, sum er sera vandamikil í hálku, og sum setir alt ov høg krøv til foreldur, starvsfólk ella avvarðandi, tá hesi allarveikastu í okkara samfelag morgun og kvøld koma og fara í rullustóli. Sethúsini eru í tveimum hæddum, men burdu verið í einari hædd. Fleiri rullustólar eru inni í húsinum, men tey fjølbrekaðu mugu berast aftur og fram, tí ov lítið rúm er til at koyra við rullustóli inn í húsunum.

Eg spurdi vinarliga, um til bar at gera nakrar sjónvarpsupptøkur. Hetta er jú ein almennur stovnur, so onki forgjørt skuldi verið at greitt frá støðuni. Eitt starvsfólk ringdi til leiðaran, sum ringdi til Almannastovuna, sum ringdi víðari til Almanna- og heilsumálaráðið. Har vóru boðini ikki óvæntað, at hetta fór ikki at lata seg gera. Orsøkin var, at nú er valstríð, og at ongin skuldi misnýtast í hesum stríði. Við øðrum orðum skal lok leggjast á neyðarrópini frá foreldrum um korini hjá fjølbrekaðum, samstundis sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum brúkar eitthvørt høvi til at rósa sær av egnum avrikum. M.a. ein nøgdsemiskanning, sum roynir at gera til onkis allar tær óhugnaligu søgurnar, sum í langa tíð hava fylt fjølmiðlarnar. Og ein fólkaheilsuætlan, sum roynir at flyta fokus frá teimum niðurslitnu sambýlunum. Ella síða upp og síða niður um allar tær gyltu ætlanirnar, sum skulu setast í verk næstu árini, hóast hann hevur havt ríkiligar møguleikar í heili 4 ár, so veljarin vónandi gloymir lítla drongin, sum við landsstýrismansins vælsignilsi varð tikin frá sínum kæru her heima, m.a. tvíburðasystir síni, fyri at vera einsamallur á stovni í fjarskotnum landi. Ovmikið av peningi eru brúktir til heilsuverkið, men hóast hetta, er støðan á Landssjúkrahúsinum verri enn nakrantíð. Nú rópa sjúkrarøktarfrøðingarnir varskó, tí viðurskiftini og arbeiðskorini eru ótolandi. Starvsfólk flýggja um háls og herðar, ikki bara úr heilsuverkinum, men eisini frá bústovnum, nærverki og enntá úr Almanna- og heilsumálaráðnum sjálvum. Men landsstýrismaðurin er so hugtikin av egnum avrikum, at hann sær als ikki neyðina. Pensionistarnir siga nú sjálvir, at kostnaðarstøðið í samfelagnum er vaksið við slíkari ferð undir hesi samgonguni, at tær ábøtur, sum eru framdar á pensjónsviðbótina og samhaldsfasta, als ikki megna at tippa tey holini, sum príshækkingarnar hava við sær.

Samgongan vil ikki viðganga, at rikni politikkurin við skattalættum, sum økja um keypiorkuna, samstundis leggur óneyðugt trýst á prísstøðið. Hetta sæst best aftur við, at landskassin nú verður hálvan veg fíggjaður við brúkaragjøldum. Munurin á skatti og brúkaragjøldum (mvg, sjúkrakassi, vegskattur, kringvarpsgjald, onnur almenn tænastugjøld) er, at brúkaragjøld eru ósolidarisk. Tey eru ”degressivur” skattur, sum rakar lág- og miðalinntøkurnar harðast, meðan landsskattur er ”progressivur”, sum rakar hægstu inntøkurnar harðast. Hendan ætlan hevur verið almenni politikkur Fólkafloksins alt tað, eg kann minnast, og nú hevur so Javnaðarflokkurin, sum skuldi verið beinleiðis mótvektin móti slíkari skipan, givið Fólkaflokkinum alt við tí úrsliti, at tað er verri nú enn nakrantíð at vera lágløntur.

**Nú má vend koma í**

Tað má ikki henda, at ABC-samgongan sleppur at halda fram. Øll tit, sum vita betur, og tit eru ikki so fá, mugu venda hesum skeiva politikki bakið, tí hann er ein hóttan móti ”vælferðarsamfelagnum fyri øll”; ABC skapti ”vælferð fyri tey vælbjargaðu”. Hesin politikkur hevur ikki evni til at bøta um umstøðurnar hjá teimum fjølbrekaðu, hann megnar ikki at skipa eitt vælvirkandi heilsuverk, og hann megnar ikki at tryggja javnari býti millum allar føroyingar, so eitt nú pensionistar fáa meiri burturúr hvørjari krónu. Tað løgna er, at hesin blandingspolitikkurin heldur ikki hevur megnað at stýrt, so vinnulívið fær betri karmar. Fiskivinnan liggur í andaleypi av ovurfígging, og fiskivinnan á landi bløðir út, vegna vantandi arbeiðsmegi. Nú mugu stig takast, so bæði vinnulív og almennar tænastur aftur koma til heiður og æru. Tað ber snøkt sagt ikki til at koyra allar hugsandi hugsjónir í ein og sama pott og so vóna, at smakkurin verður brúkiligur.

# Føroyar skulu verða við í ES



Val

MAJ-BRITT JACOBSEN
X við lista B

Um vit skulu tryggja vælferðina í Føroyum, er eingin vegur uttan um ES.

Tey flestu londini í Europa eru longu limir í ES. Hettar hava lond sum eru munandi størri enn Føroyar, sæð sum neyðugt fyri at tryggja teirra vælferð. Hettar hevur ikki verið uttan kamp, tí tað er altíð ein ótti fyri tí ókenda. Eisini í Føroyum hava nakrir flokkar verið ágrýtnir, at skapa ræðumyndir av ES. Veruleikin er nú einaferð tann, at um vit ikki skulu gerast eitt fátækt triðjaland. So er eingin vegur uttan um ES.

Tað er bara ein spurningur um tíð, so fellur tann danska krónan burtur til frama fyri evruna. Tá hettar hendir, so standa Føroyar við sínum egna gjaldoyra. Hettar er tann føroyski búskapurin ikki sterkur nokk til. Tann føroyska fullveldiskrónan fer at rasla niður í virði, og okkara gjaldføri verður akkurát null. Tað er tí umráðandi at Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, og limir í ES. So at vit kunna skifta til evruna saman við Danmark, og harvið tryggja okkara vælferð.

Tað er tíverri ein sannroynd, at tann føroyska vinnan líðir undir at vit ikki eru við í ES. Vinnan manglar arbeiðsmegi, og ger hettar at útflutningurin er skerdur. Eisini verður tollur lagdur á tilvirkaðan fisk, sum vit flyta inn í ES. Hettar ger at vit flyta alt ov stórar mongdir av ótilvirkaðum fiski av landinum, og harvið missa tann størsta partin av vinninginum. ES er ein marknaður við knapt 500 milliónum fólkum, og okkara høvuðsmarknaður.

Vit mugu og eiga tí kanna treytirnar fyri limaskapi í ES, so vinnan fær best møgulig kor.

Hetta vil eg arbeiða fyri.

Gott val

# Um at byggja á sand ella á hellu



Val

JENIS AV RANA
Formaður Miðfloksins

Vit kenna øll dømið úr Bíbliuni um teir báðar, ið bygdu. Annar bygdi oman á jørðina, hin á hellu. Hjá tí fyrra gekk illa. Stormurin kom og húsið fall. Men hjá tí seinna eydnaðist væl. Húsið varð standandi í stormunum. ( lukas kap. 6,ørindi 48 & 49).

Í øllum lívsins spurningum er avgerðandi at tryggja grundar-lagið. Umráðandi er at fáa neyðugu náttar-hvíluna. Ongin klárar seg uttan heilsu-góðan mat. Okkum tørvar vitaminir, bústað, vinir v.m. Gloyma vit hesi virðini, eru vit sum hann, ið bygdi oman á jørðina. Vit farast og lív okra fer spakuliga til grundar.

Í politikki eru sama galdandi. Man má raðfesta rætt, taka tað týdningar-mesta framum. Tí hevur Miðflokkurin deilt sín politikk í tvey. Vit nevna tey grund-leggjandi málini fyri tey primeru. Hini kalla vit fyri tey sekun-deru.

Primeru málini eru sum grundin undir húsinum. Tey mugu verða trygg, annars rapar alt. Allur politikk-urin kann rapa, eins og húsið, ið varð bygt á sand.

Fremst av primeru málunum er, at politkk-urin er bygdur á Bíbliunnar læru. At landsins lógir samsvara við Bíbliuna. At moral-urin og etikk-urin er sum bíblian lærur. At umsorg-anin fyri teimum veiku, gomlu, sjúku og t.d menningar-tarnaðu er út frá kærleika Bíbli-unnar. Vit eiga at fylgja Jesusar fyri-dømi, tá vit hjálpa øllum treingj-andi.

Eru tey primeru málini í lagi, er lætt at byggja landið. Tí tá er tað á tryggum grund-vølli.

# EDB samgonga



Val

DÁNIAL PETUR HANSEN
Varamaður hjá Sjálvstýrisflokkinum

Ikki einasti møguleiki fyri D

Sjálvstýrisflokkurin hevur av miðlunum í seinastuni verið spurdur hvørjar samgongumøguleikar hann kundi hugsað sær eftir valið.

Ein spennandi møguleiki, sum hevur verið nevndur, er ein EDB samgonga millum tjóðveldi, sambandsflokkin og sjálvstýrisflokkin.

Sjálvstýri við sínum stig fyri stig hevði her verið bindliðið millum teir báðar flokkarnar sum standa longst frá hvørjum øðrum í spurninginum um loysing ella samband.

Men samgongumøguleikarnir eftir valið fyri sjálvstýri eru fleiri, og fer flokkurin sjálvsagt eftir at fáa størst møguliga ávirkan.

Vit stilla upp við einum sterkum liðið sum veruliga kann bjóða hinum av, men vit taka bert eitt stig í senn tí tað gevur úrslit.

Vit telja 17, og hava innsungið ein stig fyri stig valsang.

Á nýggju heimasíðu míni HYPERLINK ”http://www.dph.fo” www.dph.fo kunnu tit hoyra stig fyri stig valsangin.